**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Yvirlitstrolingar. Túrur nr. 0860**
**Tíðarskeið: 15-22/8 2008**

**Fólk við frá Fiskirannsóknarstovuni:** Regin Kristiansen, Lis Larsen, Rógvi Mouritsen, Jákup Reinert (15-20/8), Inga Kristiansen (15-20/8), Hallur Joensen (20-22/8) og Petur Steingrund (20-22/8).

**Ábyrgd:** Jákup Reinert, ið eisini var toktleiðari 15-20/8. Petur Steingrund var toktleiðari 20-22/8.

**Endamál:** Hetta var annar túrurin av yvirlitstrolingunum á sumri í ár. Høvuðsendamálið við hesum túrum er at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu sløgum. Magakanningar skulu eisini gerast av toski, hýsu og upsa. Umframt skal vekt, tal og longdarbýti skrásetast fyri øll fiskasløg, ið verða veidd, og tilfar til m.a. aldursgreining av gulllaksi, havtasku og svartkjafti skal eisini fáast til vega.

**Reiðskapur og útgerð:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum. Steinhamns lemmar. Breitlar 60 og 120 m. Vanligur grunnur.

**Um túrin:** Hetta var annar túrurin av yvirlitstrolingunum á sumri í ár. Hetta er 13. árið, har gjørdir verða tveir túrar á 2 vikur og við 200 trolstøðum íalt. Støðirnar liggja spjaddar kring allan Landgrunnin, og tóvað verður í 1 tíma so vítt møguligt á sama tóvi ár undan ári (Mynd 1). Arbeitt verður alt samdøgrið. 132 trolstøðir vórðu tiknar á tí fyrra túrinum, so til hendan túrin vóru 68 trolstøðir eftir; tær lógu yvirhøvur vestan- og sunnanfyri.




**Mynd 1**. Yvirlitstrolingar á sumri við Magnusi Heinasyni. Landgrunnurin er býttur upp í 15 øki eftir dýpi og ætt. Ávíst tal á støðum verður tikið í hvørjum øki, tilsamans 200 støðir fyri allan Landgrunnin. Somu støðir verða tiknar á hvørjum ári.

Farið varð av Havnini beint eftir midnátt 15/8. Vit byrjaðu eystan fyri Sandoynna og fóru suður á Munkagrunnin. Tóku síðan tær djúpu støðirnar norðureftir. Sunnudagin máttu vit á Havnina, tí at ein feilur var í einum mátibretti. Vit fóru eisini inn á Havnina mikudagin, tí Jákup og Inga skuldu í land og Hallur og Petur umborð í staðin. Tá vóru tær grunnu støðirnar frá Vágahavinum til Mýlingsgrunnin tiknar.

**Prøvataking:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini, og eitt yvirlit yvir tal á nytru- og magaprøvum sæst í talvu 1. Samstundis sum nytrur vórðu tiknar, varð sum vant eisini skrásett longd, vekt, kyn og búningarstig, og regluliga vórðu magar tiknir av tí nytraða fiskinum.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** 28. august var túrurin er klárur at leggja í basuna.

**Fyribils úrslit:** Talva 1 vísir sløgini, ið vórðu fingin á hesum túrinum. Mest varð fingið av upsa, og síðani komu hýsa, lítli kongafiskur, gulllaksur, hvítingsbróðir, toskur og knurrhani.

Mynd 1 vísir nøgdina av úrvaldum fiskasløgum í tíðarskeiðnum 1996-2008, har tey ovastu liva á grunnum vatni og tey niðastu djúpt. Tað er framvegis sera lítið til av toski, sum er í samsvari við síðstu stovnsmeting. Tó var meira at fáa av heilt smáum toski (10 cm) enn vanligt. Tað bendir á, at umstøðurnar í sjónum eru vorðnar betri, sum passar væl saman við, at gróðurin í mai-juni í ár var yvir miðal. Lítið var at fáa av hýsu. Hetta merkir møguliga, at stovnsmetingin av hýsu hevur verið ov bjartskygd. Tó var meira av smáari hýsu at fáa enn vanligt hevur verið seinastu umleið 7 árini. Stovnsmetingin av upsa var tengd at stórum óvissum, men vísti kortini, at nógv var til av upsa. Hendan yvirlitstrolingin bendir á, at upsanøgdin er minkandi.

Nøkur fiskasløg hava sum heild víst eina niðurgongd í tíðarskeiðnum 1996-2008, og tey eru víst til vinstru á Mynd 1. Sum dømi kann nevnast: toskur, hýsa, hvítingur og svartkjaftur. Onnur fiskasløg hava ikki nakra greiða uppgongd ella niðurgongd, og tey eru víst í miðjuni á Mynd 2. Dømi eru: tunga, kalvi, upsi, havtaska, blálonga og møguliga gulllaksur. Uppaftur onnur fiskasløg eru vorðin meira vanlig, sum víst til høgru á Mynd 1. Dømi eru: knurrhani, reyðsprøka, hvítingsbróðir, brosma og møguliga longa og svartkalvi. Tað er merkisvert, hvussu væl brosma og longa fylgjast.

Magakanningar vístu, at toskur át nebbasild í størri nøgdum enn í fjør, men tó ikki so nógv sum í 1999-2001, og nógv varð etið av svimjikrabbum. Ljóskrabbar (krill) eru vorðnir meira vanligir í upsamagum.

Fiskirannsóknarstovan, 28. august 2008

<u>Petur Steingrund</u>

| Fiskaslag | Kg per 68 støðir | Nytrur | Magar |
|---|---|---|---|
| UPSI | 7455.068 | 276 | 61 |
| HÝSA | 6031.685 | 376 | 77 |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 5588.956 | | |
| GULLAKSUR | 4279.350 | | |
| HVÍTINGSBRÓÐIR | 3848.555 | | |
| TOSKUR | 1422.680 | 368 | 88 |
| KNURRHANI | 1316.714 | | |
| STÓRI KONGAFISKUR | 983.265 | | |
| HAVMÚS | 813.864 | | |
| LONGA | 598.936 | | |
| HVÍTINGUR | 491.795 | | |
| SVARTKJAFTUR | 402.216 | 11 | |
| ROSSAMAKRELUR | 325.723 | | |
| TUNGA | 266.688 | | |
| TRANTKONGAFISKUR | 234.489 | | |
| SKRAMBUL | 230.761 | | |
| REYÐSPRØKA | 194.754 | | |
| HAVTASKA | 185.868 | 32* | |
| KALVI | 175.355 | | |
| KJAFTSVARTI KONGAFISKUR | 155.091 | | |
| LÁLLA | 109.670 | | |
| AGNHØGGUSLOKKUR | 102.152 | | |
| GLASKVOYSA | 99.315 | | |
| BROSMA | 93.609 | | |
| MAKRELUR | 87.400 | | |
| SILVURMURTUR | 67.732 | | |
| SANDSPRØKA | 55.358 | | |
| BLÁLONGA | 45.935 | | |
| LOLIGO | 40.097 | | |
| SKØTA | 34.260 | | |
| KJAFTSVARTI HÁVUR | 19.534 | | |
| BÚKSVARTI HÁVUR | 18.593 | | |
| OCTOPUS | 15.246 | | |
| HVASSASPREK | 9.328 | | |
| LÝSINGUR | 7.000 | | |
| STEINBÍTUR | 6.835 | | |
| SILD | 6.210 | | |
| MORA | 5.330 | | |
| HVALSPÝGGJ | 4.880 | | |
| LÍTLA BROSMA | 1.958 | | |
| GLÝSUFISKUR | 0.953 | | |
| HUMMARI | 0.576 | | |
| RÆKJA | 0.575 | | |
| SÚGÁLUR | 0.240 | | |
| NEBBASILD | 0.010 | | |
| Tilsamans | 35834.609 | 1031 | 226 |

* Ikki nytrur men illicium ("tráðan").

Talva 1. Veiða, nytrur og magar á túri 0860.




Mynd 1. Veiða per støð (kg per tíma) av úrvaldum fiskasløgum 1996-2008.